# Botnuppgerð við Margáir



BOTNLIÐ

*Tað er long tíð síðan, at EB/Streymur var partur av eini botnuppgerð, men eftir laku úrslitini higartil lýgur stigatalvan ikki*

*Mynd: savnsmynd*

**VODAFONEDEILDIN** Tað eru mong ár síðani EB/Streymur hevur spælt ein botndyst, men Kristi Himmalsferðardag verður talan um eina reina botnuppgerð, tá AB kemur á vitjan við Margáir

Ólavur Øre Hansen

Hvør skuldi trúð tí, at sundalagsmenn skuldu liggja á níggjunda plássi eftir ar seks dystir eru spældir. EB/Streymur hevur bert vunnið ein dyst higartil í kappingini, umframt at hava leikt tveir javnleikir móti Víkingi og ÍF.

Ein av ársøkunum til ringu gongdina hjá sundalagsmonnum, er tann langi skaðalistin, sum teir hava at stríðast við, og í síðsta dysti í Runavík mátti Dánjal Davidsen av vøllinum við skaða.

Tað er ikki bara hjá sundalagsmonnum, at tað hevur gingið illa higartil. Mótstøðuliðið við Margáir í morgin, AB, hevur havt eina sera vánaliga byrjan uppá kappingarárið. Tvey stig er úrtøkan eftir seks dystir.

Eins og EB/Streymur, so eru argjamenn skerdir til dystin við Margáir. Verjukempan Morten Overgaard fór út við skaða í dystinum móti ÍF, og vandi er fyri at hann verður burtur frá fótbóltinum í longri tíð. Tað er avgjørt ein smeitur fyri AB verjuna at Morten ikki verður við, tí tað er í verjuni at AB hevur havt tað sera trupult í ár.

Hvørki av liðunum hevur ráð at tapa dystin. EB/Streymur skal vinna fyri at halda sambandið við liðini á ovaru helvt, meðan argjamenn skulu til at fáa nøkur stig sum skjótast, fyri ikki at verða isoleraðir í botninum.

**»** **Ein av orsøkunum til ringu gongdina hjá sundalagsmonnum, er langi skaðalistin, teir hava at dragast við**

# ÍF á veg fram

**VODAFONEDEILDIN** Tað hevur gingið gott hjá fuglfirðingum í síðstuni, og sigurin í síðsta umfari á Argjum gevur boð um eitt ÍF lið við breiðari hópi enn áður

Ólavur Øre Hansen

Tað hevur verið trupult at meta um styrkina á ÍF liðnum, men nú er okkurt sum týðir uppá at fuglfirðingar hava ein hóp, sum kann vera við í ovaru helvt í deildini. Hetta kann ljóða sum ein skøva fløga, tí tað sama var sagt undan kappingini í fjør, men tá útiblivu úrslitini.

Men í ár er okkurt sum týðir uppá at tað er ørvísi. Til dystin á Argjum manglaði ÍF Rógva Jacobsen, Jovevic og Høgna Zachariasen men fuglfirðingar vístu at teir eisini kunnu uttan ein so týðandi leikara sum Rógva. Tað gevur ábendingar um eitt ÍF lið við eini ávísari breidd.

Mótstøðuliðið hjá fuglfirðingum Kristi Himmalsferðardag er FC Suðuroy. Suðuroyingar hava higartil havt eitt gott kappingarár, og í síðsta dysti eydnaðist teimum at leika javnt móti B36, og má tað metast at vera eitt gott úrslit hjá uppflytarunum.

Sum skilst eru gestirnir úr Suðuroy fullmannaðir til dystin, meðan tað er meira óvist hjá ÍF. Høgni Zachariasen verður eftir øllum at døma ikki tøkur.

Um fuglfirðingar skulu halda góðu gongdini, so skulu vinna á uppflytarunum úr FC Suðuroy. Men tað kann verða lættari sagt en gjørt.

*post@sosialurin.fo*

# HB er favorittur, men...

**VODAFONEDEILDIN** Føroyameistarnir úr HB skulu Kristi Himmalsferðardag til Sandoynna, at leika móti uppflytarunum úr B71

Ólavur Øre Hansen

Tó at HB er at meta sum favorittur at vinna á uppflytarunum úr B71, so hava sandoyingar áður víst, at við góðum stríðsvilja kunnu teir gott geva sterkari liðum skarpan gang.

Ofta vísir tað seg at uppflytarar hava trupult við at venja seg við støðið. Men tað hevur gingið rímiliga gott hjá sandoyingum higartil í kappingini. Í teimum síðstu trimum dystunum hevur B71 fingið fimm stig, og serliga javnleikirnir á útivølli móti ÍF og Víkingi tala um eitt B71 lið, sum ikki skal undirmetast.

Tað er tó ein missur fyri sandoyingar at Marko Stanic ikki verður við. Serbiski miðvallarleikarin fekk tveir daga leikbann, fyri rasistiskar útsagnir í dystinum móti FC Suðuroy.

Føroyameistarnir úr HB hava ikki enn fingið rættuliga glið á spælið, men tó hava úrslitini sum heild verið góð hjá havnarliðnum. Somuleiðis hevur HB víst evni at vinna dystirnar í síðstu løtu, og vístu teir aftur síðsta sunnudag, at einki er liðugt fyrr enn dómarin hevur brikslað fyri síðstu ferð.

Sum skilst úr HB, so eru allir mans tøkir til dystin móti sandoyingum.

Hvussu er og ikki, so er lagt upp til eina áhugaverda uppgerð inni í Dali, millum uppflytarnar úr B71 og føroyameistarnar úr HB. Havnarmenn eru uttan iva favorittar at vinna dystin, men skulu tó ikki undirmeta sandoyingar, sum áður hava víst at við góðum stríðsvilja er møguligt at fáa stig ímóti serkari liðum.

*post@sosialurin.fo*